Tjóðveldisflokkurin vil vera føroyska røddin á fólkatingi

– Tað snýr seg ikki um danskan politikk. Vit vilja bert vinna føroysku tjóðini rættindi og virðing, varð sagt, tá ið Tjóðveldisflokkurin kunngjørdi valskránna og valevnini til komandi fólkatingsval. Flokkurin stillar 18 valevni upp til fólkatingsvalið, og flokkurin sær onga løgfrøðiliga ella tjóðskaparliga forðing fyri hesum

Høgni Hoydal heldur ikki, at núverandi fólkatingsumboðini gera nóg mikið við at skapa virðing fyri føroysku tjóðini. Hann heldur, at Tjóðveldisflokkurin kann fáa hetta í rættlag. Hann sigur seg eisini vera til reiðar sjálvan at fara á fólkating
Mynd: Jens Kr. Vang

FÓLKATINGSVALIÐ
Heri á Rógvi

18 valevni stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin til komandi fólkatingsval. Listin telur fleiri kend nøvn. Allir løgtingsmenninir hjá flokkinum uttan Signar á Brúnni og Finnbogi Ísakson stilla upp. Ùr landsstýrinum stilla Høgni Hoydal og Karstin Hansen upp. Av øðrum á listanum kunnu vit nevna: Sjúrð Skaale, Torbjørn Jacobsen, Jógvan Arge, Zakarias Wang, Rana Nolsøe, Olgu Biskopstø og Turið Sigurðardóttir.

Hetta eru øll rættiliga kend nøvn, og tað tykist sum um, at Tjóðveldisflokkurin má sigast at hava ein rættiligan góðan møguleika til komandi fólkatingsval.

Eisini Kristina Háfoss, sum hevur skrivað fleiri lesarabrøv stillar til vali hesaferð. Úr Eysturoynni stilla eisini Jóanes Eliasen og Andrea Eldevig upp.

Av teimum, sum eru á listanum, so má Høgni Hoydal mestir roknast fyri at vera mest sannlíka evni upp á ein fólkatingsmann, men eisini fleiri aðrir kanditatar kunnu hugsast at fara at gera um seg. Sjúrður Skaale og Torbjørn Jacobsen hava báðir verið nógv frammi í fjølmiðlunum og teirra meiningar eru eisini rættiliga kendar. Tað verður mestir millum hesar báðar, at dysturin um annað plássið á listanum fer at vera ímillum. Heini O. Heinesen, sum varð stóri atkvøðuslúkarin hjá flokkinum við seinasta val, hevur hesaferð fingið rættiliga harða kapping. Umframt Høgni og hinar, so fær hann eisini kapping frá trimum øðrum valevnum í Norðoyggjum.

Zakarias Wang hevur eisini áður víst, at hann kann savna nógvar veljarar, og tað verður spennandi at vita, um hann framvegis eigur eitt sindur av fólkatokka eftir.

Føroyska røddin

Føroysku umboðini á fólkatingi skulu, sambært Tjóðveldisflokkinum, ikki leggja seg út í innanhýsis danskan partapolitikk. Tað er ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum, at teirra umboð skal ella skulu vera trygdin fyri, at fullveldisætlanin vinnur á mál. Umboð Tjóðveldisflokksins á fólkatingi vil bert virka fyri at vinna føroysku tjóðini rættindi og virðing.

Ætlanin er, at hesi komandi fýra árini á fólkatingi skulu vera eitt virðiligt farvæl til heimastýrið og umboðanina á dana tingi.

Tað eru nníggju punkt á valskránni hjá Tjóðveldisflokkinum til komandi fólkatingsval, sum umfata bæði føroyska málið, føroysku rættindi, ognarrætt og búskaparligu viðurskiftini.

Tjóðveldisvalevnini síggja okkum forðing fyri, at tey stilla upp til fólkatingsvalið hesaferð. Til spurningin um hetta ikki er at góðtaka donsku grundlógina, so er svarið, at flokkurin viðurkennir ikki, at hon er fólkarættarliga avgerandi fyri føroyingar.

– Tað eru danir sum ikki halda grundlógina, sigur Zakarias Wang.

Tjóðveldisflokkurin vil sum áður nevnt ikki leggja seg út í partapolitisk mál á fólkatingi, men avvísa samstundis ikki, at teir vilja stuðla einari ávísari danskari stjórn. Treytin er bert tann, at henda stjórnin eisini skal virka fyri tjóðskaparligu rættindunum hjá føroyingum.

Høgni Hoydal heldur ikki, at teir nú hava brynja seg út til fólkatingsvalið merkir, at teir ikki trúgva upp á fullveldistilgongdina longur.

– Tjóðveldisflokkurin vil vera eitt umboð fyri tjóðina, segði Høgni Hoydal týsmorgunin, tá ið Tjóðveldisflokkurin helt tíðindafund.

Um tað verður soleiðis, at bæði Tjóðveldis- og Fólkaflokkurin verða valdir inn á fólkating, so ætlar Tjóðveldisflokkurin at royna at ávirka Fólkaflokkin sum mest, soleiðis, at eisini Fólkaflokkurin fer at spæla enn minni partapolitiskan leiklut á fólkatingi.

Vil eingin ganga ynskjunum hjá Tjóðveldisflokkinum á møti á fólkatingi, so vil flokkurin vera í andstøðu móti restini av fólkatinginum, sigur Zakarias Wang.

Okkara Land

Umframt at leggja fram, hvat Tjóðveldislflokkurin ynskir at gera til komandi fólkatingsval, so vórðu eisini dagførdu stevnumiðini hjá Tjóðveldisflokkinum løgd fram á tíðindafundinum,

Stevnumiðini hava tað so tjóðskaparliga heitið Okkara Land. Úr Tjóðveldisflokkinum verður upplýst, at stevnan framvegis er tann sama, men stevnumiðini eru dagførd. Stevnumiðini staðfesta støðuna hjá flokkinum á at kalla øllum økjum. Tað er sjálvsagt spurningurin um sjálvstøðu Føroya, sum stendur ovast, men eisini á fleiri øðrum økjum, m.a. á tí búskaparliga økinum, hevur flokkurin dagført síni stevnumið.

Heini O. Heinesen og Kristina Háfoss stilla bæði upp til fólkatingsvali fyri Tjóðveldisflokkin. Kristina er nýggj í politikki
Mynd: Jens Kr. Vang

Johannes Martin stillar ikki upp

Føroyski fólktatingsmaðurin árini frá 1994 til 1998 stillar ikki uppaftur hesaferð. Hann sigur seg vera lidnan við henda partin av sínum lívi, hóast hann hevur fingið onkra áheitan

Johannes Martin Olsen hevur áður verið fólkatingsumboð fyri føroyingar, men hann stillar ikki upp 20. november

FÓLKATINGSVAL
Heri á Rógvi

Hann er rættiliga kendur innanfyri føroyskan politikk. Í áttatiárunum satt hann okkurt skifti sum eykamaður á fólkatingi. Í 1994 gjørdist hann fólkatingsmaður, tá ið tann fyrst valdi hjá Sambandsflokkinum, Edmund Joensen, var løgmaður. Hann sat á fólkatingi árini frá 1994 til 1998 fyri Sambandsflokkin. Við valið í 1998 varð hvørki hann ella flokkur hansara valdur aftur á dana ting. Hann fekk 876 persónligar atvkøður, men tað rakk ikki til hjá hvørki honum sjálvum ella hjá Sambandsflokkinum.

Hóast tað við valið í 1998 ikki vóru nógvir, ið fingu omanfyri 800 persónligar atkvøður, so heldur Johannes Martin Olsen seg ikki til at stilla upp hesuferð. Hann hevur í fleiri ár verið fastbúgvandi í Danmark, og hann býr í dag í Randers, sum liggur á eystursíðuni av Jútlandi. Hann royndi fyri nøkrum árum síðani at gerast formaður í Sambandsflokkinum, men tapti formansvalið móti táverandi formanninum, Edmundi Joensen. Hann hevur ikki verið so nógv at hoyrt og sæð til, men hann sigur seg framvegis fylgja við í føroyskum viðurskiftum.

Johannes Martin er so við og við komin upp í árini, og hann ætlar sær ikki at stilla upp til fólkatingsvalið hesaferð.

– Eg eri mestsum liðugur við henda partin av lívinum, og eg haldi meg ikki til at stilla upp hesaferð, sigur Johannes Martin Olsen.

Hann sigur seg hava fingið onkra áheitan, men hevur valt ikki at taka av tilboðnum.

– Tá eg kanska ikki havi havt so nógv við føroysk viðurskifti at gera, so er tað spurningurin, um tað er rætt hjá mær at stilla upp, sigur Johannes Martin Olsen.

Fyrrverandi fólkatingsmaðurin er ættaður av Strondum, og tað var eisini her, at hann fekk stóran part av sínum atkvøðum til fólkatingsvalini.

Johannes Martin roknar við einum spennandi vali, og hann vónar at hansara flokkur fær annan mannin.

Tvey tilboð upp á Skálafjarðarleiðina

Ternan I gevst at sigla, tá Skálafjarðarleiðin er útlisiterað, og verður avloyst av eini tvíkilju

Knøpp hálvtriðja millión er á muni millum tilboðini upp á Skálafjraðarsiglingina, sum Strandferðslan hevur boðið út

ÚTBJÓÐING
Edvard Joensen

HT Transport í Gøtu og P/F Thor í Hóavík hava boðið upp á Skálafjarðarleiðina, sum Strandfaraskip Landsins hava boðið út.

Tilboðini vóru eitt sindur ójøvn. Tað hægra, tað frá Thor, var upp á 10.220.950,- krónur, meðan HT Transport beyð sær til at røkja leiðina fyri 7.750.000,- krónur.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at Strandfaraskip Landsins hava treytað sær at velja millum tilboðini,. So tað verður ikki bara av sær sjálvum tikið við tí lægra tilboðnum, sigur hann.

Bæði feløgini, sum boðið hava, hava skip tøk til siglingina. Ávís krøv eru sett til skipini. Millum annað at tey skulu ikki vera eldri enn frá 1990, og at tey í minsta lagi skulu ganga 20 míl. Hesar treytir lúka bæði skipini, sum feløgini hava í boði. Skipið, sum HT Transport hevur í boði, er í vinnu, meðan skipið hjá Thor er spildurnýtt og jüst latið av skipasmiðju ní Noreg.

Lægra tilboðið, sum kom inn, er á leið tað dupulta av tí, siglingin kostar Strandferðsluni í dag, sigur Poul Jákup Thomsen.

Men hann leggur afturat, at talan í hesum førinum er um nógv betri skip enn Ternuna I, sum í dag røkir rutuna. So tænastan, sum væntast kann, verður ikki at líkna við tær umstøður, í dag eru umborð á Ternuni I.

Tordur verður verandi

Tað ganga nógvar søgur um uppstilling í Sjálvstýrisflokkinum í kjalarvørrinum av ósemjuni, sum komin er í flokkin. Men hvørki Tordur Niclasen ella Lasse Klein siga seg fara upp í Sjálvstýrisflokkin

UPPSTILLING
Edvard Joensen

Tordur Niclasen verður verandi í Miðflokkinum, og Lasse Klein er als ikki uppi í politikki. Báðir avsanna, at teir skulu vera bidnir at stilla upp á sjálvstýrislistanum í Eysturoy til fólkatings- og løgtingsvalini, sum standa fyri.

Í Eysturoynni ganga tveir fyrrverandi løgtingsmenn, sum á einhvønn hátt eru vorðnir gott samtaluevni hjá fólki, nú rok er í Sjálvstýrisflokkinum. Lasse Klein er fyrrverandi løgting- og landsstýrismaður fyri Sjálvstýrisflokkin, meðan Tordur Niclasen hevur umboðað bæði Kristiliga Fólkaflokkin og Miðflokkin á tingi og í landsstýrinum. Um báðar verður gitt, at teir skulu stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin til komandi valini. Men báðir avsanna, at soleiðis er.

Tordur Niclasen, sigur, at hann hevur verið á fyrsta uppstillingarfundi hjá Miðflokkinum í samband við løgtingsvalið. Men hann er ikki biðin um at stilla upp og hevur heldur onga støðu tikið til, um hann fer at gera tað.

– Men eitt er púra greitt, sigur hann, at fari eg at stilla uppaftur, verður tað fyri Miðflokkin. Hasar søgurnar um, at eg skal fara upp í Sjálvstýrisflokkin, hava einki upp á seg.

Eisini veðrur gitt, at fyrrveraandi sjálvstýrismaðurin, Lasse Klein, fer at stilla upp aftur fyri Sjálvstýrisflokkin, eftir at hann seinast stillaði upp fyri Kristiliga Fólkaflokkin, sum ikki fekk umboð á tingi.

Men Lasse Klein sigur stutt, at hann er farin burtur úr politikki, og í løtuni ongar sum helst ítøkiligar ætlanir hevur um at byrja aftur.

Tíðindabrævur úr New York:

Heldur soldátar enn generalar

Leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum skuldi heldur hugsað um at fingið nakrar meinigar soldátar í flokkin, enn at berjast um, hvør skal vera generalur, heldur Kári P. Højgaard, løgtingslimur, sum er staddur á ST aðalfundinum í New York

Kári P. Højgaard

New York: Tað er skelkandi og lítið hugaligt uppliva, at samstundis sum Sjálvstýrisflokkurin í hesum døgum á altjóða stigi saman við øllum góðum kreftum roynir at tryggja heimsfriðin í ST, skal ófriður og stríð valda innanflokks. Sámal Petur og Helena hava hesi seinastu árini verið við til at mynda føroyskan politikk og prógvað sín dugnaskap, og lítið er at ivast í, at flokkurin hevur brúk fyri øllum góðum kreftum. Ilt er at fáa eyga á, hvat positivt úrslit kann spyrjast burturúr at skifta leiðara, nú so stutt er eftir av valskeiðinum. Okkum er størri tørvur á soldátum heldur enn generalum.

Sum helst flestu vita heima, var New York Marathon sunnudagin. Umleið 30.000 luttakarar vóru við úr øllum heiminum. Stórir og smáir, høgir og lágir. M.a luttók statsministarin í Slovenia Mikulas Dzurinda. Millum 5 teir fremstu av monnunum vóru 3 úr Kenya og 2 russarar. Hjá kvinnunum var tann fyrsta úr Etiopia, og nr. tvey og trý úr Kenya.

Fólkatingsvalið hevur sett síni spor, og tríggir fólkatingslimir sum stillað uppaftur, tóku avgerð um at fara heim fríggjadagin. Teir hava bert tríggar vikur til valstríðið, so teir krevja at leggja seg í selarnar fyri at fáa eitt gott val og tryggja sær enn eitt fýra ára skeið í Fólkatinginum.

Útsýnið suður av toppinum á Empire State Building er frálíkt

Tað er ótrúligt, sum amerikumenn eru blíðir og hjálpsamir. Tað vísir seg, sum um teimum dámar sera væl at verða spurdir um hjálp. Av tí at vegakervið er uppbygt vid Aveveu longs og Streets tvørs í talrekkju, kann ein nærum ikki fara skeivur. Eg havi, fyri at koma í tal við fólk, nýtt høvið at spyrja um ymiskt, og geva teir sær góða tíð at greiða frá tí, spurt er um. Næstan altíð endar tað vid spurninginum, hvar ein er frá. Enn havi eg ongan hitt, sum veit hvat ella hvar Føroyar eru. Tað nærmasta var maðurin aftan fyri diskin í Postal Administration FN, sum segði seg hava hoyrt navnið, og helt at Føroyar lógu í Eystursjónum.

Týsdagin 6 november er borgarstjóraval í New York. Sjónvarpið hevur sent regluligar lýsingar frá valevnunum. Tveir liggja ájavnt í meiningskanningunum. Annar er mediamillióningurin Mike Bloomberg, sum verdur stuðlaður av núverandi borgarstjóra og er Republikanari. Hitt er demokraturin Mark Greene. Spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer. Annars má sigast, at valið er merkt av syrgiligu hendingunum 11 september, bumbuhóttanum og herjanini av Anthrax pulvur, sum gevur eitt døkt baksýni.

Vit hava tað gott øll somul og kenna okkum trygg. Komandi vikuskifti verður hæddarpunktid í hesi 56 setuni í ST. Tá koma teir stóru at taka orðið. Sum vanligt fær Brasilia fyrst orðið og síðan verður tað amerikanski forsetin George Bush, sum kemur at tosa í 15 minuttir. Teir fortaldu á morgunfundinum hjá donsku sendinevndini, at ST ár 2000 hevdi roynt eina nýggja skipan, har tríggjar lampur vóru á talarastólinum. Ein grøn lampa lýsti, meðan tala vard, ein gul tá talutíðin var um at vera liðug og ein reyð, tá tíðin var úti. Tá Fidel Castro leiðari á Cuba fekk orðið, legði hann ein lummaklút oman yvir lampurnar og talaði seg lidnan. Hetta førdi til lógvabrestir frá luttakarunum og er lítið hugsandi, at hendan skipan verður nýtt aftur.

Eg fari at enda hesa ferð og senda bestu heilsur heim til Føroyar.